## VIÐMERKINGAR

# Fyrispurningur til Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharra

MORTAN JOHANNESEN
Skipari



Havið altíð hildið okkara fiskimálaráðharra verið ein siðiligan og fyrikomandi mann, sum altíð gevur eitt greitt og rættvíst svar tá hann verður spurdur, men so var ikki tá hann svaraði Kára P. Højgaard einum fyrispurningi í Tinginum í seinastu viku.

Spurningurin var hesin! Hví bleiv fiskidagaskipanin á Føroya Banka broytt í 2005 fyri snellubátar sum eru í bólki 5? Soleiðis at skilja, at nú er ein snelludagur sum ein fiskidagur, men árini 2003/2003/2004 taldu 2 snelludagar sum ein fiskidagur. Svarið hjá Bjørn Kalsø var hetta, at onki var broytt í skipanini, og var ein snelludagur=ein fiskidag, soleiðis var tað og soleiðis bleiv tað.

Havi liggjandi framman-fyri mær Fiskiloyvið hjá M/B Tvíburðum TN 440 undir 15 tons og í bólki 5. Har stendur at 2 snelludagar telja sum 1 fiskidagur á Bankanum. Hetta stóð nokk ikki bara í mínum loyvi, men hjá hinum eisini, so her er nakað alvorliga galið, sum ikki hongur saman hjá Bjørn Kalsø. Tí fari eg at spyrja landsstýrismannin í fiskimálum um, tá umrøddu snellubátar undanfarin ár hava fiskað á Bankanum 18-25-28 – ella kanska heilar 30 dagar, og ikki átt meira enn 15 dagar hava hesi so ikki fiskað brand ólógliga, og hevur Fiskiveiðieftirlitið ikki snorksovið, tá allir fiskidagar eru uppgivnir fyri Fiskiveiðieftirlitinum og teir onki hava sagt, men góðtikið fiskaríið.

Tað má tykjast at vera ússaligt, at bert ein maður í Landsins hægsta tingi ger vart við, at umrøddi skipabólkur yvir eina nátt verður skerdur 50% í fiskidøgum.

Vónandi kemur hetta í rættlag, áðrenn bankin opnar 2. mai.

# Kappingin um best røktu bygdina verður broytt

**Tema fyri »Best røkta bygd« í 2006 verður »Áir og strandarlinja«, og verða tær tríggjar greinarnar í kappingini sostatt: »Best røkta bygd«, »Best røkta á« og »Best røkta strandarlinja«**

BEST RØKTA BYGD



Nú verður aftur skipað fyri tiltakinum ”Best røkta bygd”, verður boðað frá í tíðindaskrivi.

Tiltakið hevur verði fýra ferðir áður og tríggir ymiskir vinnarar hava verið.

Skipað hevur verðir fyri tiltakið annað hvørt ár, men vegna serligar umstøður varð ikki skipað fyri tiltakinum í 2005. Tískil eru trý ár síðan seinast.

### Nýggjur leistur

Í mun til undanfarin ár er tiltakið í ár eitt sindur broytt, tó við gamla leistinum sum grundarsteini og við sama endamáli:

“Endamálið við “Best røkta bygd” er at vekja áhuga fyri føroysku náttúruni og umhvørvinum, siði og mentan. Tiltakið skal menna ein hugburð við ansni fyri náttúru – og mentunarvirðum. Hetta merkir at at farið verður væl um og at náttúran verður vird sum hon er og at umhvørvisviðurskiftið eru í lagi. At fólkalívsminnir verða vard og varðveitt, og at byggivirksemi hóskar væl inn í mentunararv og náttúrugivnar fortreytir.”

Í 2005 varð mett at tíðin var komin til at endurskoða tiltakið og at ein nýggjur leistur fyri tiltakið við fleiri greinum og fleiri virðislønum skuldi gerast. Vónin við tí nýggja leistinum er at økja um áhugan fyri tiltakinum millum fólk og at økja um talið av luttakarum.

Heitið “Best røkta bygd” verður framhaldandi heitið á tiltakinum. Tó verða, umframt ”Best røkta bygd”, tvær aðrar greinar sum kappast skal í.

Hesar eru partur av einum serligum tema fyri kappingina, har serligur dentur verður lagdur á at vekta og lýsa serligar partar av náttúruni og umhvørvinum.

Tema fyri “Best røkta bygd” í 2006 verður: “Áir og strandarlinja” og verða tær tríggjar greinarnar í kappingini sostatt: “Best røkta bygd”, “Best røkta á” og “Best røkta strandarlinja”.

Tá luttakarnir melda seg til tiltakið ”Best røkta bygd” í 2006 melda teir seg til ein pakka við trimum greinum, sum kappast verður í.

Greinarnar eru sjálvstøðugar kappingar har ein vinnari verður kosin til hvørja.

Vinnarin av “Best røktu bygd” verður, sum undanfarin ár, kosin út frá einari heildarmeting av umhvørvisstøðuni í bygdini.

Vinnarin av “Best røktu á” verður kosin út frá einari meting av heildarmeting av ánni og umhvørvið við ánna. Á sama hátt verður vinnarin av “Best røktu strandarlinju” kosin út frá einari heildarmeting av strandarlinjunum.

# Bót til Bata

**Bót til Bata skipar fyri hugnaløtu í Suðuroy fyri kvinnum, sum eru skurðviðgjørdar fyri krabbamein í brósti.**
**Avvarandi eru eisini vælkomin.**

BÓT
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Bót til Bata skipar fyri hugnaløtu í Suðuroy fyri kvinnum, sum eru skurðviðgjørdar fyri krabbamein í brósti.

Avvarandi eru eisini vælkomin.

Bót til Bata er ein sjálvhjálparbólkur undir Føroya Felag móti Krabbameini.

Tað er ein bólkur við kvinnum, sum eru skurðviðgjørdar í brósti. Hesar hava fingið upplæring í at veita stuðul, vegleiðing og ráð til aðrar kvinnur, ið skulu skurðviðgerast ella eru skurðviðgjørdar fyri krabbamein í brósti.

Hugnaløtan verður í Stóra pakkhús í Vági, leygardagin 22. apríl frá kl. 14.00 til umleið 16.00

Heidi Hvidbro fer at greiða frá, hvussu tað var at fáa staðfest bróstkrabba

Og um arbeiðið í Bót til Bata

Um tygum ynskja at luttaka, vinarliga boða frá luttøku í seinasta lagi fríggjadagin 21.apríl 2006, hjá Føroya Felag Móti Krabbameini telefon 317959/ 217959/ 217957, ella tedupost adressa krabbamein@krabbamein.fo

# Flaggdagsrenning 2006 í Trongisvági

**Á triðja sinni verður skipað fyri renning á Flaggdegnum. Tað er blóðgevarafelagið í Suðuroy, sum hevur verið fyriskipari hini árini, men í ár kemur nýggja ítróttarfelagið Hvistan eisini at standa fyri tiltakinum.**

Byrjað verður við skúlan í Trongisvági kl. 15.oo, møtt verður við útibarnagarðin.

Runnið verður inneftir Hvalbiarvegnum, runt ”Sterlling” og út eftir Hvannavegi, og er tað strekkið uml. 5 km.

Kappingin er fyri børn og vaksin. Gjørt verður vart við at øll - ung og eldri, skjót og minni skjót - eru vælkomin. Tú ert sjálvsagt eisini vælkomin at ganga allan teinin.

Tá komið er á mál, fáa allir luttakararnir frukt, saft og kaffi.

Heiðursmerkið verður latið nr. 1,2 og 3 í hvørjum aldurs-bólki, og teir eru:

Veteranar: 45 ár og eldri
Vaksin millum 15 og 44 ár
Børn millum 10 og 14 ár
Børn millum 6 og 9 ár

Luttøkugjaldið er 30 kr fyri vaksin og 10 kr fyri børn, og tú meldar til 15-30 min. áðrenn.

# Dansiskeið við Anitu

Anita á Lofti fer nú aftur undir at hava dansiskeið. Áður hava skeiðini verið væl umtókt. Anita hevur drúgvar royndir innan dans og hevur eisini arbeiðsroyndir við nøkrum av teimum stóru innan undirhald

Anita á Lofti hevur millum annað verið koreografur og dansari hjá FCK Cheerleaders. Hon hevur dansað á konsertum og mótasýningum og hevur eisini dansað til framførslur hjá Johnny Deluxe, L.O.C og øðrum. Dansiskeiðini við Anitu verða Yviri við Strond, har Yndi heldur til.

-do-